## Kim Simonsen stuðul til verkætlan



Kim Simonsen, mag.art, hevur fingið játtað 1.9 mió. kr. úr danska Granskingarráðnum fyri mentan og samskifti - Forskningsrådet for Kultur og Kommunikation. Játtanin er til verkætlan við heitinum "At erindre nationen - Atlas over litteraturens rolle som skaber af færøsk erindringspolitik og dens sociale betydning for fremkomsten af færøsk litterær kulturel nationalisme 1817-1888. Endamálið við verkætlanini er at kanna, hvussu bólkar og tjóðir umskipa og fyrisita teirra minni um fortíðar viðurskifti. Ætlanin er at vísa, hvønn týdning eldri bókmentir hava havt fyri skapanina av føroyskari minnismentan og fyri minnis- og samleikapolitikkin í 20. øld. Verkætlanin fer fram á Institut for Kultur og Identitet á Roskilde Universitetscenter. Hetta veit Granskingarráðið frá at siga.

# Sjagaklettur fiskað seg 11 ferðir aftur



*Sjagaklettur við bryggju í Hvalba. Í seks ár hevur skipið, sum varð keypt úr Íslandi fyri 3,5 miljónir krónur, fiskað fyri tilsamans 120-125 miljónir krónur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Síðan lemmatrolarin Sjagaklettur varð keyptur úr Íslandi fyri umleið seks árum síðan, hevur skipið fiskað samlaðu íløguna 11 ferðir aftur. – Skip og høvuðsmotorur eru 33 ár, men hetta hevur ikki verið nakar bági, sigur reiðarin, Mikkjal Hammer**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast gongdin í føroyska heimaflotanum ikki er serliga positiv í løtuni, eru tó glottar ímillum.

Ein av hesum glottum er at finna í lemmatrolaranum Sjagakletti, sum hvalbingar keyptu úr Vestmannaoyggjunum fyri umleið seks árum síðan.

Sjagaklettur telist millum teir lemmatrolarar, ið hava minsta høvuðsmotorin, sum er javngamal við skipið, ið er 33 ára gamalt.

Meðan flestu ísfiskatrolarar langt síðan hava fingið sær kryvjimaskinur, hevur manningin á Sjagakletti kruvt fiskin sjálv.

Tað er ikki fyrr enn í ár, at skipið hevur fingið kryvjimaskinur.

### Góð íløga

Mikkjal Hammer er reiðari á Sjagakletti. Sjálvur siglur hann við Steintóri, sum er ein annar lemmatrolari í Hvalba. Mikkal siglur sum skipari og onkuntíð sum stýrimaður.

- Vit kunnu bara lata væl at gongdini hjá Sjagakletti, síðan vit keyptu fyri umleið seks árum síðan.

Reiðarin sigur, at keypsprísurin var 3,5 miljónir krónur, og tá klárt var at loysa, stóð Sjagaklettur í umleið 11 miljónum krónum.

- Tá høvdu vit gjørt ymiskar ábøtur á skipið, umframt at veiðiloyvið hjá Beintu, fyrrverandi Brimborg, sum var heimahoyrandi á Tvøroyri, varð keypt.

Mikkjal Hammer sigur, at tað hevur gingið væl hjá Sjagakletti, sum eftirtíðin hevur víst var ein góð íløga.

### FAKTA

| | |
|---|---|
| **Smíðiár**: | 1975 |
| **Longd**: | 46,47 m. |
| **Breidd**: | 9 m |
| **BRT** | 296 |
| **Maskina**: | M.A.K. 8M 451 |
| **Ferð**: | 11 sjómíl |
| **Eigari**: | P/F Sjagaklettur |

### Fiskað væl

- Skipið hevur fiskað fyri fleiri ferðir tað, sum vit keyptu tað fyri, og skipið hevur soleiðis fiskað samlaðu íløguna fleiri ferðir aftur.

Reiðarin vísir á, at besta árið var í 2007, tá skipið fiskaði fyri 24,5 miljónir krónur. Í ár liggur veiðivirðið um 20 miljónir krónur.

Meginparturin av veiðini hjá Sjagakletti hevur verið upsi.

- Taka vit øll seks árini, síðan skipið kom í flotan, hevur Sjagaklettur fiskað fyri einar 120-125 miljónir krónur. Raksturin hevur hingið saman øll árini, sigur reiðarin.

Hann vísir á, at hóast aldurin á skipi og høvuðsmotori er 33 ár, hevur felagið ikki rent seg í stórvegis trupulleikar hesi árini.

- Nei, eg noyðist at banka uppundir borðið. Vit hava verið hepnir og mugu ásanna, at tað hevur gingið

# Kristian Martin hevur bjóðað



**- Vit vildu gjarna verið við til at endurreist alt virksemi av nýggjum, men soleiðis, sum landið sær út til at liggja í løtuni, eru útlitini døpur, sigur Jóhan Páll Joensen.**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum skilst, telist Kristian Martin Rasmussen, nótaskipareiðari, millum áhugaðu keypararnar av ísfiskatrolarunum, sum áður vóru heimahoyrandi í Klaksvík, men sum Føroya Banki nú eigur.

- Jú, eg kann vátta, at vit hava tosað saman her norðuri, og at okkara útspæl er, at Kristian Martin Rasmussen keypir skipini, sum kunnu verða við til at tryggja okkum ráfiskagrundarlagið á Kósini.

Jóhan Páll vísir á, at upprunaliga ætlanin hjá honum og Maru Seafood, nú Føroya Banki keypti skipini á tvingsilssølu, var at keypa skipini aftur og reisa virksemið av nýggjum.

- Men vit koma eftir øllum at døma ikki longur, leggur hann aftrat.

Jóhan Páll sigur, at hugskotið við at Kristian Martin Rasmussen keypir nøkur av skipunum, meðan Maru Seafood framhaldandi rekur virkini og tey skip, sum eftir eru, ivaleyst hevði verið ein gongd leið burtur úr støðuni.

- Men sum vit her norðuri skilja, liggur alt í óvissu, nú vit skilja, at stórur áhugi eisini er aðrastaðni fyri skipunum, sigur hann.

### Virksemið hótt

Jóhan Páll Joensen ásannar, at alt virksemið hjá Maru Seafood er hótt, og nú einki fiskaarbeiði er á Kósini og Norðís Seafood á Eiði, verður helst bara ein spurningur um tíð, nær alt er farið.

- Vit vildu gjarna verið við til at endurreist alt hetta virksemi av nýggjum, men soleiðis, sum landið sær út til at liggja í løtuni, eru útlitini døpur, sigur Jóhan Páll Joensen.